

# Elkaðal úr Íslandi fer ikki at løna seg

**Jan Müller**

24.06.2014 - 17:56

Oljan.fo

Tað fer ikki at løna seg fíggjarliga at selja elorku ígøgnum ein orkukaðal úr Íslandi inn á evropska meginlandið. Tað sigur íslendingurin Baldur Eliasson, sum fyrr hevur sitið í leiðandi starvi hjá svensk-sveisiska orkurisanum ABB.

Baldur Eliasson (myndin) sigur í samrøðu við Morgunblaðið, at menn eiga at hugsa um, at kaðalin verður tann longsti av sínum slagi, og at tað er djúpt, har hann ætlandi skal liggja. Tí væntar hann, at kaðalin fer at kosta milliardir av dollarum, og tá so hugsað verður um tann lága orkuprísin í Evropa, verður tað torført at fáa pengarnar aftur, sigur hann.

Baldur Eliasson ávarar samstundis íslendingar ímóti at selja elorku av landinum. Hann væntar, at íslendingar fata at fáa brúk fyri orkuni sjálvir, sum frá líður, og at tað tí er skeivt at selja orkuna av landinum.